# Leiðbeining til lærarar

# Týskt

## 8. – 9. floksstig

Krøvini til lærugreinina týskt á 9. floksstigi eru ásett í námsætlanini í týskum og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – týskt 8-10
- Støðisnámsætlan
- Leistur – próvtøkugrundarlag
- Leistur – eftirmeting og afturboðan
- Leistur – ársætlan fyri lærugrein
- Leistur – undirvísingargongd

# Innihaldsyvirlit

1. Kjarnaøki ... 3
1.1. Talaða málið ... 3
1.2. Skrivaða málið ... 3
1.3. Málkunnleiki ... 4
1.4. Mentan og samfelag ... 5
2. Førleikar ... 5
2.1. Lurtifatan ... 6
2.2. Lesifatan ... 6
2.3. Taluførleikar ... 7
2.4. Skriviførleikar ... 7
2.5. Málfatan ... 8
2.6. Mentanarfatan ... 8
3. Eftirmeting og próvtøka ... 9
3.1. Eftirmeting og afturboðan ... 9
3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet ... 9
3.3. Munnlig próvtøka á 9. floksstigi ... 10
3.3.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á 9. floksstigi ... 11
3.3.2. Próvtalslýsing ... 12
4. Ársætlan og undirvísingargongdir ... 13

# 1. Kjarnaøki

*Lærugreinin týskt hevur fýra kjarnaøki, ið eru tey somu frá lægsta til hægsta stig. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Talaða málið*
- *Skrivaða málið*
- *Málkunnleiki*
- *Mentan og samfelag*

*Týskt 8-9*

Kjarnaøkini umskarast, soleiðis at skilja, at flestu tekstir og arbeiðshættir hava eyðkenni frá meira enn einum kjarnaøki. Tískil verður fyri tað mesta arbeitt á fleiri kjarnaøkjum samstundis, hóast denturin kann liggja á ávísum kjarnaøki.

## 1.1. Talaða málið

*Kjarnaøkið talaða málið snýr seg í týskum um, at næmingurin mennir sínar samskiftisførleikar í týskum. Hetta kjarnaøkið fevnir tí um at lurta, tosa og leggja fram í ymiskum felagsligum høpum. Í undirvísingini skal tí hugt verða at ymiskum samskiftissnildum og ymiskum lurti- og taliháttum. Umráðandi er, at tosað verður á týskum máli í mest møguligan mun í undirvísingini.*

*Týskt 8-9*

Serliga fyrstu tíðina eigur undirvísingin at leggja dent á kommunikativa partin, so at næmingarnir kunnu ogna sær týsk orð og hugtøk, sum stuðla undir virkisføri, t.e. funktionalitet. Tað er týdningarmikið, at næmingarnir áhaldandi fáa samanborið týsk orð og hugtøk við føroyskt og/ella mál, sum tey duga frammanundan.

Mál er altíð samskifti, og mál hevur altíð eina funksjón í menniskjaligum sambondum. Við at arbeiða við innihaldi, sum gevur meining fyri næmingarnar, ber til at skapa ein kommunikativan tørv hjá næmingunum, soleiðis at tey verða motiverað til at luttaka í samskifti um eitt ávíst evni.

Grundfatanin í hesi kommunikativu tilgongdini er, at ein lærir at samskifta við at samskifta; samskifti er sostatt um somu leið bæði førleikamál og amboð í undirvísingini.

## 1.2. Skrivaða málið

*Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg um, at næmingurin mennir sínar lesi- og skriviførleikar í týskum. Hetta kjarnaøkið fevnir um at lesa, fata og skriva við støði í ymiskum tekstsløgum úr týskmæltum økjum. Í hesum sambandi verður arbeitt við ymiskum lurti- og lesiháttum og hóskandi hjálparmiðlum.*

*Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg sostatt eisini um at víðka um orðfeingið, umframt viðgerð av tekstum, og er á tann hátt eisini við til at stuðla upp undir talaða málið.*

*Týskt 8-9*

Skriving sum lærimiðil hevur stóran týdning fyri máltøkuna hjá næmingunum, tí hon mennir málfatanina, sum er við til at styrkja lesifatan, tekstfatan og samskiftisførleikar. Skrivligi parturin í lærugreinini stuðlar tískil upp undir arbeiðið við taliførleikanum.

Skrivaða málið snýr seg eisini um tekstviðgerð, og tá er tað umráðandi, at undirvísingin tekur støði í víðkaða teksthugtakinum.

**Víðkað teksthugtak**

"Tekstur er ein og hvør frásøgn ella samanhangandi sekvensur, ið er tongdur at einum ávísum øki, og sum í arbeiðinum við eini uppgávu gevur høvi til málsligt virksemi" (umsett úr Den Fælles Europæiske Referenceramme for Sprog (CEFR)).

Við teksti verður sostatt hugsað um eina røð av tekstsløgum og miðlum: skrivað og talgilt; visuelt og auditivt. Undirvísingin eigur tí ikki einans at byggja á skrivaðan tekst, men fevna um eitt breitt úrval av analogum og talgildum tekstum, herímillum eisini filmsbrot, ljóðbrot og myndir.

## 1.3. Málkunnleiki

*Kjarnaøkið málkunnleiki snýr seg um, at næmingurin gjøgnum tekstir og samskifti fær innlit í og lærir seg grundleggjandi týskar ljóðreglur, bendingar og setningsbygnað, umframt at komið verður inn á semantikk í fremmandamálsligum høpi. Grundleggjandi kunnleiki til málbygnaðin í týskum mennir samskiftisførleikar og málfatan næminganna sum heild.*

*Týskt 8-9*

Undirvísing í týskari mállæru, t.e. í grundleggjandi ljóðreglum, bendingum og setningsbygnaði, er neyðug fyri, at næmingarnir kunnu ogna sær førleikarnar at orða seg skilliga, skriva og tosa mállæruliga rætt og nýta eitt breitt orðfeingi. Undirvísingin í mállæru eigur í størstan mun at verða tongd at arbeiðinum við øðrum pørtum av lærugreinini, til dømis tekstlesnaði og munnligum og skrivligum samskifti, soleiðis at næmingarnir læra mállæru í veruligum samanhangum og støðum, har málið verður nýtt í verki.

Málkunnleiki snýr seg eisini um, at næmingarnir verða tilvitaðir um egnan læritørv, og hvussu ymiskar snildir og amboð kunnu vera við til at menna tann partin av týska málinum, sum næmingurin hevur tørv á at styrkja, t.d. við lurti-, lesi- og samskiftissnildum.

### 1.4. Mentan og samfelag

*Kjarnaøkið mentan og samfelag snýr seg um, at næmingurin fær eina tilvitaða fatan av mentan og samfelag í londunum, har týskt er høvuðsmál. Í hesum kjarnaøki verður sostatt arbeitt við hóskandi evnum, sum eyðkenna mentan og samfelag í týskmæltum londum og økjum. Undirvíst verður tí í tekstum frá nýggjari og eldri tíð, einum breiðum úrvali av øðrum enn bókmentaligum tekstum á ymiskum torleikastigum frá nýggjari og eldri tíð um almenn, mentanarlig og samfelagslig evni. Týðandi mentanarlig og samfelagslig viðurskifti í týskum máløkjum verða tikin við í undirvísingina.*

*Týskt 8-9*

Kjarnaøkið mentan og samfelag hevur til endamáls, at næmingarnir fáa eina grundleggjandi og tilvitaða fatan av mentanarligum og samfelagsligum viðurskiftum í londum og økjum, har týskt er høvuðsmál. Við at arbeiða við ymiskum tekstum, myndum, ljóði og filmum læra næmingarnir, hvussu dagligt lív, virðir, siðir og samfelag eru skipað í týskmæltum londum.

Arbeiðið við mentan og samfelag stuðlar undir førleikan at samanbera egið lív og samfelag við onnur og styrkir fatanina av ymiskleika og felagsleika millum lond og mentanir. Dømi um undirvísingarevni kunnu vera:

- Gerandisdagur og ungdómslív í týskmæltum londum
- Skúli og frítíð
- Mentan, siðir og høgtíðir
- Tekstir frá nýggjari og eldri tíð
    - bæði bókmentaligir og aðrir tekstir (t.d. greinar, sangir, heimasíður, filmar)
- Samanbering millum Føroyar og týskmælt lond.

# 2. Førleikar

Fakligu førleikamálini eru orðað eftir besta próvtali soleiðis at skilja, at um næmingurin hevur ognað sær førleikamálini væl og virðiliga fær hann/hon próvtalið 12. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

Førleikarnir verða ognaðir gjøgnum undirvísingarevnini í kjarnaøkjunum umframt við fjølbroyttum arbeiðsháttum og samspæli við aðrar lærugreinir, tá ið tað ber til. Tí er umráðandi, at hugsað verður um fakligu førleikamálini saman við innihaldinum og arbeiðsháttunum, tá ið undirvísingin verður skipað.

Fakligu førleikamálini í týskum kunnu flokkast í seks yvirskipað fremmandamálslig førleikaøki:

1. **Lurtifatan**
2. **Lesifatan**
3. **Taluførleikar**

4. **Skrivifø rleikar**
5. **Málfatan**
6. **Mentanarfatan**

## 2.1. Lurtifatan

- *at kenna stavir og ljóð í málinum*
- *at ogna sær fjølbroytt orðfeingi við støði í kendum samanhangum*
- *at lurta eftir og skilja høvuðsinnihaldið í tillagaðari talu ella samrøðu um gerandisevni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar*

*Týskt 8-9*

Undirvísingin í lurtifatan í týskum eigur at taka støði í virknari luttøku hjá næmingunum og í kendum samanhangum. Í byrjanini verður dentur lagdur á spæl og virknar arbeiðshættir, sum hjálpa næmingunum at ogna sær eitt breitt og virkisført orðfeingi. Orð og orðasambond verða tikin upp í samanhangi, har tey verða nýtt í veruligum samskiftisstøðum, og næmingarnir fáa møguleika at venja, áðrenn orðini verða sett í nýggjar uppgávur ella arbeiðshættir.

Arbeitt kann vera við task-undirvísing, har næmingarnir fyrst lurta, eygleiða og royna í tryggum karmum, áðrenn tey sjálv skulu loysa uppgávur. Lurtifatanin verður styrkt við, at næmingarnir lurta eftir samrøðum og tekstum um evni, sum tey kenna, og har nógv av orðunum eru kend frammanundan. Hetta ger tað lættari at skilja høvuðsinnihaldið.

Dentur verður lagdur á aktiva lurtifatan, har næmingarnir arbeiða við innihaldinum á ymiskan hátt, eitt nú við at knýta lurtifatan at skriving, t.d. við uppgávum, har næmingarnir lurta eftir einum teksti og seta orð inn, sum mangla. Lurtifatan verður eisini styrkt við at lurta eftir samrøðum millum aðrar næmingar í flokkinum.

## 2.2. Lesifatan

- *at lesa og skilja høvuðsinnihaldið í lættskiltum tekstum, sum umboða ymisk tekstsløg*

*Týskt 8-9*

Undirvísingin í lesifatan í týskum skal hjálpa næmingunum at skilja høvuðsinnihaldið í lættskiltum tekstum, sum nýta gerandislig orð og orð úr nærumhvørvinum. Her kunnu myndir stuðla undir, at næmingarnir skilja høvuðsinnihaldið. Eisini teknirøðir hóska væl, tí at tær hava lítið av teksti, nógvar myndir og eina týðiliga søgugongd.

Í arbeiðinum við tekstunum skal dentur verða lagdur á orðfeingi í ymiskum samanhangum. Fyri at kunna lesa og skilja tekstir er tað grundleggjandi at kenna eina ávísa mongd av orðum. Tí er arbeiði/venjing við orðfeingi ein fortreyt. Afturat hesum er viðkomandi at arbeiða við nøkrum lesisnildum. Her kann arbeiðið verða býtt sundur í áðrenn lesing, undir lesing og aftan á lesing:

- Áðrenn lesing: tosa um slag av teksti, grundleggjandi orðfeingið í tekstinum og forfatan av evninum
- Undir lesing: lesa virkið við at seta spurningar, notera og kanna ókend orð
- Aftan á lesing: arbeiða við lisna tekstinum, t.e. m.a. at kjakast um innihaldið, umseta brot ella gera stuttan samandrátt.

Í undirvísingini skulu næmingarnir fáa kunnleika til ymisk tekstsløg. Í lærugreinini verður víðkaða teksthugtakið nýtt, sum setur krøv um, at ymiskir miðlar verða nýttir í undirvísingini (sí brot 1.2. á s. 4).

## 2.3. Taluførleikar

- *at úttala orð og setningar skilliga*
- *at orða seg og greiða frá í lættskiltum málbúna um kend evni*
- *at nýta fastar orðingar og máliskur, sum koma ofta fyri í gerandismáli*
- *at nýta einfaldar samskiftissnildir*

*Týskt 8-9*

Undirvísingin í taluførleikum í týskum skal leggja dent á, at næmingarnir gerast tryggir í at úttala orð og setningar skilliga og at orða seg í einum lættskiltum málbúna um kend evni. Arbeiðið tekur støði í gerandismáli og fastum orðingum, sum koma ofta fyri í dagligum samskifti. Fastar orðingar eru "bitar" (en. chunks), sum eru føst orðasambond ella setningspartar, sum næmingar læra sum eina heild – í staðin fyri at seta orðini saman sjálvir. Dømi: *Wie geht's?, Ich heiße ..., Ich möchte ..., Darf ich ...?* Hetta eru bitar av máli, sum beinanvegin kunnu nýtast í samskifti.

Næmingarnir eru ikki altíð klárir at samskifta frítt frá byrjan, og tí kann undirvísingin verða skipað soleiðis, at tey fyrst fáa møguleika at arbeiða við samrøðum og samskifti á skrift, sum tey so taka støði í, tá ið tey sjálv skulu samskifta munnliga. Hetta kann gera tey tryggari viðvíkjandi orðavali og setningabygnaði.

Arbeitt verður við einfaldum samskiftissnildum, og samstarvslæra (cooperative learning) kann verða nýtt, har næmingarnir samskifta í pørum ella smærri bólkum. Tað kann t.d. vera við smáum kortum við spurningum og svarum, rolluspølum ella stýrdum samrøðum, har allir næmingar fáa høvi at taka lut. Dentur verður lagdur á virkið málbrúk, dirvi at tosa týskt og at brúka málið í gerandis- og kendum støðum.

## 2.4. Skriviførleikar

- *at skriva einfaldar setningar um kend evni í lættskiltum málbúna*

*Týskt 8-9*

Arbeiðið við skriviførleikunum hjá næmingunum skal verða knýtt at hinum førleikunum í lærugreinini og í ávísan mun til tey evni, sum arbeitt verður við í undirvísingini. Tað skrivliga arbeiðið

eigur sostatt at vera ein samantvinnaður partur av arbeiðinum við til dømis tekstlesing, orðfeingi og málløru.

Undirvísingin í skriviførleikum í týskum skal hjálpa næmingunum at skriva einfaldar og skilligar setningar í einum lættskiltum málbúna um kend evni. Talan kann vera um stutt talgild boð, innkeypslistar, innbjóðingar o.s.fr.

Skrivingin verður skipað stigvíst, til dømis við at næmingarnir arbeiða við stuttum tekstum, setningum ella samrøðum, sum tey síðan tillaga ella víðka.

## 2.5. Málfatan

- *at nýta sínar royndir úr móðurmálinum og øðrum málum til at menna nýggja málið*
- *at umseta hóskandi tekstir til týskt og úr týskum*
- *at nýta tvímálsligar orðalistar, orðabøkur og mállæruyvirlit*
- *í ávísan mun at brúka sína málsligu vitan aktivt á løttum týskum máli*
- *at kenna vanligar regluligar formar úr ymiskum orðaflokkum*
- *at greina einfaldar setningar*

*Týskt 8-9*

Endamálið við hesum førleikamálum er at hjálpa næmingunum at síggja mállæru og málbygnað sum eitt amboð til at skilja og brúka týskt mál.

Undirvísingin í málfatan í týskum skal taka støði í teimum málsligu royndum, sum næmingarnir longu hava úr móðurmálinum og øðrum málum. Við at gera næmingarnar varugar við líkleikar og munir millum mál, læra tey ymsar málsligar snildir til at skilja og menna nýggja málið. Hetta kann til dømis vera at síggja, at orð og setningar hava líknandi bygnað og endingar, so sum at orðingin “eg eiti” hevur somu ljóðligu ending á týskum.

Arbeitt verður við einfaldum og hóskandi tekstum, har næmingarnir umseta bæði til týskt og úr týskum. Hetta styrkir bæði orðfeingi og fatan av, hvussu málið er bygt upp. Samstundis læra næmingarnir at brúka tvímálsligar orðalistar, orðabøkur og mállæruyvirlit sum arbeiðsamboð, so at tey gerast sjálvstøðugari í arbeiðinum við málinum.

Í sambandi við mállæru og setningsgreining, kunnu næmingarnir arbeiða við einfaldum týskum setningum og áseta orðaflokkar, og hvønn leiklut ymisk orð hava í setninginum. Hetta styrkir fatanina av málsligum mynstrum.

## 2.6. Mentanarfatan

- *at greiða frá um mentan og livihátt í londum og økjum, har týskt verður talað, og bera saman við føroysk viðurskifti*

*Týskt 8-9*

Undirvísingin kann í byrjanini taka støði í, hvussu mentanarmunir eru sjónligir í gerandisstøðum, har dentur verður lagdur á gerandisligt samskifti og málbrúk, til dømis hvussu ein heilsar, spyr, takkar og vendir sær til onnur á týskum.

Næmingarnir læra, at mál og mentan eru tøtt knýtt saman, og at týskt málbrúk ofta er formligari og høviskari enn føroyskt. Við at arbeiða við slíkum munum í gerandissamskifti fáa næmingarnir innlit í mentanarligar normar og siðir, samstundis sum tey menna sín málførleika.

Arbeitt verður við einfaldum tekstum, samrøðum, myndum og filmum, sum lýsa lívið hjá børnum og ungum í týskmæltum londum. Næmingarnir verða eggjaðir til at samanbera við egið lív og egna mentan og at orða seg á týskum um ymiskt í hesum sambandi. Hetta styrkir bæði mentanarfatan og førleika at nýta týskt mál í meiningsfullum samanhangi.

# 3. Eftirmeting og próvtøka

## 3.1. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Støðisnámsætlan*

Næmingarnir skulu javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði. Hetta kann eitt nú gerast við javnan at vísa á førleikamálini og at vísa á hóskandi hjálparmiðlar og arbeiðshættir, sum næmingarnir kunnu fáa gagn av. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið ”Leistur – eftirmeting og afturboðan”, sum lærarar kunnu styðja seg til.

Umráðandi er, at lærarin leggur undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir fáa bestu fortreytir at læra. Tískil eiga undirvísingargongdir altíð at eftirmetast við tí fyri eyga at betra um undirvísingina.

Víst verður til skjalið “Leistur – undirvísingargongd”.

## 3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet

Á 8. og 9. floksstigi skulu næmingarnir gjøgnum skúlaárið hava støðumet og ársmet eftir galdandi próvtalsstiga. Vanliga fáa næmingarnir støðumet fyri jólafrítíðina og fyri páskafrítíðina og so ársmet við skúlaárslok. Í sambandi við royndir fáa næmingarnir vanliga eisini royndarmet.

Metini verða givin við støði í fakligu førleikamálunum og støðisførleikunum. Støðu- og ársmetini eru sostatt meting lærarans av, í hvønn mun næmingarnir í framdum avrikum lúka sett førleikamál, samanborið við framda undirvísing. Royndarmetini verða givin við støði í ávísum uppgávuorðingum.

Støðu- og ársmetini skulu lýsa fakliga støðið í løtuni, tá ið metini verða givin. Talan eigur sostatt ikki at vera um eina meting yvir eitt longri tíðarskeið ella eitt miðal av fleiri avrikum.

Atburður, uppmøting og arbeiðssemi eiga í sjálvum sær ikki at vera tikin við í støðu- og ársmetini.

Ársmetini á 9. floksstigi eru endalig og verða sett í prógv næminganna.

## 3.3. Munnlig próvtøka á 9. floksstigi

*Próvhoyringin varir 20 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 20 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.*

*Próvtøkutilfarið skal fevna um evni og øki, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Í fyrireikingini kann próvtakarin einans nýta útflýggjaða próvtøkutilfarið og orðabøkur. Undir próvhoyringini kann próvtakarin nýta próvtøkutilfarið og notur, sum hann/hon hevur gjørt í fyrireikingartíðini.*

*Próvtøkan er tvíbýtt:*

1. *Fyrri parturin av próvhoyringini er ein samrøða við støði í framløgu próvtakarans av ókendum tilfari, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Tilfarið fevnir um ókendan tekst á umleið ½ normalsíðu og lurtiroynd, sum samrøtt verður um á føroyskum.*

2. *Seinni partur er uttan fyrireiking og fevnir um upplestur á týskum úr einum stuttum, kendum tekstbroti á umleið ¼ normalsíðu, sum próvtakarin umsetir. Síðan verður samrøtt um kenda tekstin á týskum.*

*Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.*

*Sama próvtøkutilfar kann í mesta lagi verða nýtt tvær ferðir í sama flokki/bólki.*

*Týskt 8-9*

Próvhoyrarin ger próvtøkuspurningarnar, sum skulu sendast próvdómara í seinasta lagi sjey dagar undan próvtøkuni. Einstaki próvtakarin skal hava í minsta lagi fýra próvtøkuspurningar at velja í. Sami próvtøkuspurningur kann verða nýttur tvær ferðir. Próvtøkutilfarið skal breitt umboða tey kjarnaøki og førleikamál, sum eru ásett í námsætlanini. Næmingarnir skulu fáa at vita, hvørjir evni og tilhoyrandi tekstir verða givin upp til próvtøkuna. Tekstir frá 8. flokki skulu hava verið lisnir aftur í 9. flokki fyri at vera partur av próvtøkutilfarinum. Mælt verður til at geva umleið 15-20 normalsíður upp. 1 normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

**Viðvíkjandi fyrra parti**: Próvtakarin trekkir fyrst ein ókendan tekst á uml. ½ normalsíðu og ein upplisnan ókendan tekst á ljóðfílu, t.e. lurtiroynd. Ljóðfílan skal vera á umleið 2-3 minuttir, sum svarar til umleið 1 normalsíðu. Próvtakarin fær 20 minuttir at fyrireika eina framløgu á føroyskum av tekstinum og lurtiroyndini. Tilfarið skal ikki stava frá einum verki, sum er lisið í síni heild ella í

brotum í undirvísingini, men kann til dømis vera eitt brot úr einum øðrum teksti eftir sama høvund. Tekstir úr tekstasavnum verða fataðir sum sjálvstøðugir tekstir og kunnu tí verða nýttir.

Umráðandi er, at tekstirnir eru eins viðvíkjandi torleikastigi, soleiðis at næmingarnir eru javnsettir. Glosur kunnu gerast til torfør orð, sum hava serliga merking í ávísum samanhangi ella sum ikki kunnu sláast upp í orðabók.

Saman við ókenda tilfarinum kunnu vera leiðbeinandi spurningar, sum siga próvtakaranum, hvat hann/hon skal koma inná í framløguni og samrøðuni.

Í fyrireikingarhølinum hevur próvtakarin einans loyvi at nýta útflýggjaða tekstin og orðabøkur. Skúlin má syrgja fyri, at næmingurin hevur atgongd til eina teldu í fyrireikingini, sum bert hevur atgongd til talgildar orðabøkur og lætta atgongd til ljóðfílurnar. Loyvt er ikki at nýta umsetingarforrit, og avrikið skal vera sjálvstøðugt, so tí er vitlíki heldur ikki loyvt at nýta. Próvtakarunum er ikki loyvt at samskifta við umheimin í fyrireikingini.

**Viðvíkjandi seinna parti**: Hesin parturin er uttan fyrireiking. Eftir at fyrri partur er avgreiddur, trekkir próvtakarin ein kendan tekst, sum hevur verið partur av undirvísingini. Próvtakarin skal lesa upp og umseta tað úr tekstinum, sum svarar til umleið ¼ normalsíðu. Síðan tosa próvtakari og próvhoyrari um tekstin á týskum.

Próvhoyringin kann verða býtt upp soleiðis:

**Leiðbeinandi tíðarbýti**

**1. partur (á føroyskum):**
Framløga av ókendum teksti og lurtiroynd: 3-4 minuttir
Samrøða: 2-3 minuttir

**2. partur (á týskum):**
Upplestur og umseting: 4-5 minuttir
Samrøða: 4-5 minuttir

Í alt: uml. 15 minuttir

### 3.3.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á 9. floksstigi

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður serliga lagdur á, at próvtakarin:*

- *skilir og dugir at greiða frá ókenda tilfarinum á føroyskum*
- *dugir at lesa og umseta kenda tekstin*
- *evnar at greiða frá kenda tekstinum á týskum.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans, har hvør parturin telur ½.*

*Týskt 8-9*

Tá ið próvtøkan verður mett, er týdningarmikið at leggja dent á tað, sum próvtakarin dugir, og ikki einans á villur og manglar. Heildarmetingin hevur størri týdning enn einstakir smálutir. Dentur eigur ikki at verða lagdur á føroyska málið, tá ið greitt verður frá ókenda tilfarinum, soleiðis at skilja, at um próvtakarin ikki er stinnur i føroyskum, telur tað ikki niður í próvdømingini, um hann/hon bert annars vísir góða fatan av tekstinum.

### 3.3.2. Próvtalslýsing

| Próvtal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Frágreiðingin um ókenda tilfarið er væl grundað, og próvtakarin vísir sera góða tekstfatan.<br><br>Upplesturin er flótandi, úttalan sera góð og greið, og umsetingin er neyv.<br><br>Týska málið er fjølbroytt, gott og neyvt, og við breiðum orðfeingi. Samskiftið er týðiligt og livandi, og próvtakarin dugir sjálvstøðugt at leggja fram og at halda samtaluni í gongd. Próvtakarin vísir gott innlit í mentan og samfelag í teimum londum, har týskt verður talað. |
| **7** | Gott | Frágreiðingin um ókenda tilfarið er rímiliga væl grundað, og próvtakarin vísir góða tekstfatan.<br><br>Upplesturin er góður og sum heild rættur, úttalan góð og skillig, og umsetingin er rímiliga neyv.<br><br>Týska málið er samanhangandi og skilligt og við grundleggjandi orðfeingi. Samskiftið er skilligt, og próvtakarin dugir sjálvstøðugt at leggja fram og taka lut í samtaluni á nøktandi hátt. Próvtakarin vísir í ávísan mun innlit í mentan og samfelag í teimum londum, har týskt verður talað. |
| **02** | Nøktandi | Frágreiðingin um ókenda tilfarið er trilvandi, og próvtakarin hevur skilt tekstin so dánt.<br><br>Upplesturin er óneyvur, men próvtakarin dugir sum heild grundreglurnar fyri úttalu. Umsetingin er óneyv – próvtakarin skilir partar av tekstinum, men samanhangurin er kámur.<br><br>Týska málið er skilligt, men málsliga veikt. Samskiftið gongur trekt og er merkt av týðandi málsligum villum, men próvtakarin skilir og dugir |

| | | |
|---|---|---|
| | | grundleggjandi gerandisorðfeingi og megnar at gera seg nøkulunda skilligan. Próvtakarin vísir í lítlan mun innlit í mentan og samfelag í teimum londum, har týskt verður talað. |

# 4. Ársætlan og undirvísingargongdir

Tíðliga í skúlaárinum skal ársætlanin fyri lærugreinina vera tøk. Ársætlanin er eitt yvirskipað skjal við yvirliti yvir ráðlagdar undirvísingargongdir fyri skúlaárið.

Lærarin skal so hvørt í undirvísingini gera ítøkiligar lýsingar av hildnum undirvísingargongdum. Nakað fyri skúlaárslok skulu undirvísingargongdirnar fyri farna skúlaár skrivast lidnar. Endamálið við undirvísingargongdunum er at skjalfesta, at undirvísingin hevur lokið krøvini í galdandi námsætlanum. Undirvísingargongdirnar eru eisini støði undir munnligu próvtøkuni og verða latnar próvdómara.

Víst verður til skjølini: "Leistur – ársætlan fyri lærugrein" og "Leistur – undirvísingargongd".